Ein mannfólkainnsatsur

Hóast hann sjálvandi kundi hugsað sær ein sigur, so var landsliðsvenjarin ovurfegin um hugburðin, sum leikarar høvdu sýnt, tá alt annað annars tóktist ganga ímóti

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

- Tað kann væl vera, at vit mugu grava onkran nýggjan leikara fram, men tað má so vera tað. Tað eru væl saktans eisini aðrir leikarar í landinum, sum duga at spæla hondbólt, heldur Lars Nedergaard, tá vit umrøða støðuna við skaðunum á landsliðnum

Mynd: Álvur Haraldsen

Føroyska liðið kundi eins væl vunnið dystin móti Belgia sum nakað annað, og tí kundi ein kanska hildið, at Lars Nedergaard iðraði seg um, at hetta var av ongum. Men tá vit eftir dystin fingu orðið á føroyska venjaran, var kortini ilt at fáa eyga á hetta.

- Sjálvandi er tað rætt, at eitt føroyskt lið eigur at kunna taka hetta liðið, men tú mást eisini hyggja at fortreytunum. Vit manglaðu Áka Mørk og Sámal Joensen longu áðrenn vit fóru undir hesa undankappingina. Í dag var Tróndur ikki við, Sveinur liggur í songini við fepuri, og Mortan Hansen hevur eisini verið sjúkur, tó at hann var við. Og so missa vit eisini Áka Olsen tíðliga í dystinum. Alt tað eru leikarar, sum vanliga spæla á bakplássunum, og tá so nógvir týðandi leikarar eru burturi, so má tað blíva tungt.

Fyrsta floks hugburð

At alt hetta so kortini spældi so hampuliga væl av, heldur Lars einans vera stríðsviljanum hjá leikarunum at takka.

- Eg eri tó errin av leikarunum, sum sýndu ein veruliga mannfólkainnsats. Teir stríddust sum úlvar á skóg allan dystin. Vit máttu umrokera, bara fyri at hava leikarar á øllum plássum, men hóast broytingarnar, so var hugburðurin hjá leikarunum alla tíðina fyrsta floks, og tað kann eg ikki vera annað enn nøgdur um. Kanska stóð nógv á seinastu løtuna, tá vit óttaðust, at orkan fór at ganga undan, men teir stóðu seg allir kortini. Kanska er skeivt at taka nakran framum, men eg haldi avgjørt, at Áki G. Olsen skal hava eitt veldugt herðaklapp fyri mátan, sum hann kom inn í dystin uppá, og so má eg eisini nevna Inga. Hóast nógv hevur staðið á, so kom hann kortini heim til dystin, sum hann vildi vera partur, og hóast ferðamøðina, so spældi hann allan dystin.

- Og lat meg so eisini nevna áskoðararnar. Kanska høvdu teir lisið tað, sum varð skrivað um teir eftir dystin móti Ísrael, men lat tað fara. Í dag føldu vit veruliga, at vit vóru á heimavølli, og tað var okkum ein fantastiskur stuðul.

At enda spurdu vit Lars, hvørjar vónir hann hevði til seinna dystin móti Belgia, og ikki minst, hvussu fortreytirnar til hendan dystin eru. Er yvir høvur nakað lið at senda avstað.

- Tað veit eg ikki. Tað kann væl vera, at vit mugu grava onkran nýggjan leikara fram, men tað má so vera tað. Tað eru væl saktans eisini aðrir leikarar í landinum, sum duga at spæla hondbólt.

Men eftir dystin í dag, er í hvussu er eingin orsøk at óttast mótstøðuna í næsta dystinum.

- Óttast skal man ongantíð. Vit ræðast í hvussu er ongan, men hinvegin hava vit virðing fyri mótstøðuni. Eisini fyri Belgia, segði Lars Nedergaard at enda.

Úr ongum í lyklaleiklut

Eftir at hava sitið á beinkinum í mest sum samfullar fýra dystir, gjørdist Áki G. Olsen ein hin týdningarmesti leikarin, tá føroska landsliðið vann sær javnleikin móti Belgia

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Eftir at hann í hinum dystinum mest hevur verið at rokna sum marginalspælari, slapp Áki G. Olsen veruliga at royna seg í dystinum mikukvøldið. Broytingar av ymsum slag høvdu við sær, at Ingi Olsen varð fluttur av vanliga plássinum yvir á bakkin, og so mátti annar miðspælari finnast.

Luturin fall á Áka G., og hóast hetta kanska hendi nakað brádliga, so helt hann ikki sjálvur, at hetta var nakað, sum nervaði.

- Nei, tað haldi eg ikki.

Áki G. Olsen vann brotskastskappingina, sum landsliðið helt týsdagin, og tí varð hann fyrsti skjúttin úr sjey metrum hesaferð

Mynd: Álvur Haraldsen

Nú havi eg í hinum dystunum sitið og bíðað eftir møguleikanum, so tá hann kom, so ráddi bara um at taka av. Tað var heldur ikki ordiliga premiera, tí eg fekk hóast alt nakað av spælitíð í dystinum í Vestmanna, men hetta var so fyrstu ferð, at eg royndi meg á miðplássinum.

Høvdu brotskastskapping

Fyrsta roysnið, sum Áki G. gjørdi í dystinum, var tó, tá hann kom inn, og setti eitt føroyskt brotskast í netið, eftir at ymsir av liðfeløgunum høvdu brent níggju brotskøst á rað. Spurdur, hvørt tað kendist sum ein lætti, at vit soleiðis fingu mál upp á brotskast, helt hann fyri, at tað í øllum førum bøtti um.

- At tað akkurát var eg, sum skuldi skjóta, komst av, at vit gjørdu eina skotkapping í venjingini týsdagin. Har stóð eg meg best, og tí varð avrátt, at eg skuldi skjóta í dag. Sjálvandi er tað kott, at vit nú skora upp á fleiri brotskøst, men hinvegin misnýtta vit framvegis fleiri, sum kanska kundu avgjørt dystin til okkara fyrimun.

- Tað er tó einki at ivast í, at vit eru fegnir um at fáa stig. Kanska skuldi tað verið meira enn ta eina, hinvegin kundu vit eisini væl staðið eftir við ongum, og tað vildi í øllum førum verið tungt. Tað týdningarmesta í so máta mundi vera, at vit allir stóðu sum ein maður, tá mest stóð á. Tað er í øllum førum nakað, sum vit soleiðis fáa brúk fyri í seinna dystinum, helt Áki G. Olsen at enda.

Finnland á odda

Finnland og Ísrael spældu fyrsta sínamillum dystin mikudagin. Av trygdarávum spælir Ísrael allar sínar dystir á útivølli, so tó at dysturin tekniskt var heimadystur hjá teimum, so varð hann leiktur í Finnlandi.

Endaliga úrslitið av dystinum gjørdist, at Finnland vann 26-23 eftir at støðan í hálvleikinum hevði verið 15-11. Skal Ísrael vinna sær víðari luttøku í kappingini, er sostatt neyðugt, at teir vinna seinna dystin við í minsta lagi fýra málum.

-jm

Skuldi ikki verið við

Hóast Ingi Olsen als ikki skuldi verið í føroyska hópinum mikudagin, so eydnaðist honum sum hin fyrsti í drúgva tíð at røkka 25 dystum á føroyska hondbóltslandsliðnum

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Sjálvur haldi eg, at eg spældi á bakkplássinum í ’88, men síðani hevur tað fyri tað mesta verið á miðjuni, og tað sigur eitt sindur um, hvussu nógv vit máttu umskipa okkum, helt Ingi Olsen eftir dystin

Mynd: Álvur Haraldsen

Ingi Olsen, føroyski landsliðsskiparin, fekk undan dystinum handaða blómutyssi, nú hann hevur rokkið 25 A-landsdysturm á hondbóltslandsliðnum.

Tá vit eftir dystin tosaðu við Inga um dystin, nýtti hann júst hetta høvið til at vísa á ein av stóru mununum millum føroyska og belgiska landsliðið.

- Eg haldi avgjørt ikki, at hatta liðið er betri enn okkara, men royndirnar, sum teir hava, eru avgjørt nakað, sum teir hava framum okkum. Sjálvur havi eg spælt allir teir landsdystir, sum hava verið leiktir síðani 1988, og nú havi eg so 25 dystir. Hjá teimum var onkur leikari, sum hevði fleiri enn 100 altjóða dystir, og tað sigur seg sjálvt, at hetta ger mun.

Gott eftir umstøðunum

Um sjálvan dystin helt Ingi annars, at eftir umstøðunum, so var tað eitt sera gott avrik hjá føroysku leikarunum.

- Tað sigur sigur seg sjálvt, at tá vit mangla so nógvar leikarar, sum vit gera í dag, so merkist hetta. Sjálvur haldi eg, at eg spældi á bakkplássinum í ’88, men síðani hevur tað fyri tað mesta verið á miðjuni, og tað sigur eitt sindur um, hvussu nógv vit máttu umskipa okkum.

- Tað gjørdi so eisini, at vit als ikki kundu spæla tað spæl, sum vit annars hava vant. Heini var at kalla einasti skjúttin, sum var eftir, og tá hann varð mansvardur, máttu vit broyta spælið fullkomuliga. Í so máta er kanska gott, at Áki G. og eg kennast somikið væl, og tá Heini eisini fall væl inn í okkara spæl, so riggaði tað hampuliga væl, tá spælið gjørdist somikið frítt. Kanska er tað eisini meira undirhaldandi, tá spælið soleiðis verður skjótt, heldur enn koyra upp á skjúttarnar. Kanska kann tað gerast eitt sindur rótut til tíðir, men tá tað riggar, so er tað stuttligt, og tibetur riggaði hetta hampuliga væl hjá okkum í dag.

Spurdur, hvørt tað ikki kendist tungt seinastu løtuna, tá føroyska liðið somikið leingi hevði spælt við somu manning, helt Ingi, at sjálvandi var tað tað.

- Ikki minst merkti hetta, at tað gjørdist sera tungt hjá okkum í verjuni. Vit máttu royna at spara upp á fólki, og tí vórðu nakrar skiftingar gjørdar, so vit ikki altíð høvdu ideal-uppstilllingina inni, men allir stríddust ótrúliga væl, og tað var so avgjørt viðvirkandi til, at vit fingu nakað burturúr dystinum.

- Tað var tó ikki bara hjá okkum. Teir vóru so sanniliga eisini moyrir. Um tú hyggur at seinna hálvleiki, so verða teir ferð eftir ferð dømdir fyri nøl, og tað má so vera tekin um, at teir ikki megnaðu at halda fast um press-spælið, sum teir annars royndu í fyrra hálvleiki. Tað er nakað sum kostar, og orkan hjá teimum var ikki somikið góð, at teir kundu køva okkum niður.

Skuldi ikki vera við

Tað var annars um reppið, at Ingi Olsen als ikki var við í hópinum, sum spældi dystin mikudagin.

Konan er í løtuni í Danmark, har hon skal eiga, og sjálvur fór Ingi niður mánadagin.

- Har hendi so einki á hesum sinni, so eg gjørdi av at koma heim til hendan dystin. Akkurát, hvussu verður við dystinum í Belgia, tori eg slettis ikki at svara fyri. Tað verður helst ein støða, sum ikki verður avgjørd fyrr enn í seinastu løtu, og tað kann kanska enntá gerast so, at eg komi við til Belgia, men noydist at venda við. Tað má so bara verða, sum tað verður, og undir øllum umstøðum er tað so ikki nakað, sum eg geri av sjálvur, segði Ingi Olsen at enda.

Áki er ivasamur til ferðina

Lærkrikin hjá sterka skjúttanum tykist ikki tola hørðu dystarskránna, og ivasamt er, hvørt hann verður við í seinasta dystinum

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

- Tað er kanska ikki so gott við ov nógvari venjing, helt Áki Olsen fyri, tá vit spurdu hann, um harða landsliðsskráin ikki hevði verið ov nógv av tí góða

Mynd: Álvur Haraldsen

Sum kunnugt, so stóð einki serligt til við føroyskum bakspælarum í dystinum móti Belgia sunnudagin. Umframt teir skaðar, sum vóru frammanundann, so noyddist Áki Olsen eisini heilt tíðliga av vøllinum av vøllinum við skaða. Hann hevur í drúgva tíð verið plágaður av einum eymum lærkrika, og mikudagin gekk so galið.

Seinastu tvey árini ella so, hevur tað eisini verið so, at vestmenningurin hevur drigist við skaðar av ymsum slag, soleiðis at venjingarstøðan ikki hevur verið tann sama, sum hon kundi verið, og á sín hátt viðgekk hann eisini, at skráin í seinastuni kanska hevði verið dekan ov hørð.

- Tað er kanska ikki so gott við ov nógvari venjing, tók hann skemtiliga til, tá vit spurdu um hetta.

- Tað er rætt, at hetta hevur verið ein trupulleiki. Í gjár (týsdagin, blðm.) merkti eg eisini nakað til hetta, so eg vandi mest sum einki tá. Hetta fyri at vera so væl fyri, sum til bar, til dystin, men tað var heilt skjótt, at eg merkti, at hetta ikki bar til. Tí var tað nokk betri at gevast, áðrenn tað gjørdist heilt galið.

At Áki soleiðis gavst, áðrenn skaðin gjørdist ov ógvusligur, hevur kanska við sær, at leikarin kortini verður við í seinna dytinum móti Belgia.

- Tað vóni eg í øllum førum. Nú má eg fáa fysioterapeutin hjá okkum at hyggja at skaðanum, og so er bara at vóna, at hann gevur grønt ljós, sigur Áki, sum annars heldur, at Føroyar áttu at vunnu dystin.

- Hatta var so eingin ræðandi mótstøða, og hyggur tú at seinastu løtuni undan steðginum, so skuldu vit verið á odda, tá farið var til hálvleiks. Hinvegin hevur tað stóran týdning, at vit hóast mótrákið fáa nakað burtur úr dystinum, tí taptu vit í evstu løtu, so vildi tað í øllum førum verið sera tungt hjá okkum at fara til útidystin, sigur Áki Olsen altso at enda.